# Ingu Falkvard Danberg

## til minnis



Tann 20. Mars andaðist okkara kæri starvsfelagi Inga F. Danberg.

Tað er óskiljandi at henda lívsterka, glaða og arbeiðssama kvinna ikki er ímillum okkum meira. Ja so óveruligt, at tað er sum um ein bert gongur og bíðar eftir til hon aftur trínur inn í handlinum í Niels Finsensgøtu og tú aftur kannst hoyra hennara gneggjandi látur og uppliva hennara lætta lyndi. Tankin um at ein ikki skal síggja hana aftur gevur onga meining. Saknurin er ómetaliga stórur og eftir henni stendur eitt stórt tómt hol.

Inga hevði fyri okkum starvsfelagar sera stóran týdning.

Fyrsta uppfatan tú fekk av henni var, at hon var bersøgin og hevði sín heilt serliga hátt at siga og gera tingini uppá. Men tá tú lærdi hana at kenna, fanst tú útav, at hon var sera ósjálvsøkin. Hon hugsaði altíð um hini fyrst, var altíð gevarin, men kravdi einki afturfyri. Hevði tú trupulleikar á arbeiðinum ella persónliga, kundi tú altíð fara til hana, tí her hevði tú ein persón, sum tú kundi tosa við í trúnaði og tú fekk altíð eitt greitt svar.

Tú kundi mangan undrast yvir alt, ið hon kundi náa. At arbeiða í handli krevur nógv av einum, kortini so hevði hon stundir at venja hondbólt, verða um familjuna, skilja fisk við pápanum vesturi í Sørvági, ganga á fjall og ikki so sjáldan samlaði hon okkum starvsfelagarnar um borðið í køkinum við nýbakaðum bollum ella køku. Ja, Inga var eitt satt konubrot við einum heitum hjarta, sum elskaði at fjálga um tey sum stóðu henni nær.

Nú tíðin er komin til ta árligu útferðina, renna tankarnir aftur til tann ógloymandi túrin úti í Mykinesi seinasta ár, har hon vísti okkum runt á sínum himmiríki á jørð.

Henda oyggj, sum hon hevði so stóran tokka til, og sum hon so mangan fortaldi okkum um.

Vit eru sera takksom fyri at vit sluppu at uppliva hana úti í Mykinesi.

Tín tíð her á jørð gjørdist ikki long, men hóast hettar so náddi tú meir enn mong náa eitt langt lív.

Hví tú Inga skuldi fara so ung, fáa vit ikki at vita - helst hevur Guð ikki kunnað verið hendan eingilin fyriuttan meira.

Takk Finn, fyri at tú alla tíðina kunnaði okkum um støðuna hjá Ingu gjøgnum sjúkraleguna. Hetta gjørdi tú hóast tað var ein svár tíð tit fóru ígjøgnum.

Er saknurin av Ingu hjá okkum stórur, so kann tað ikki lýsast, hvussu stórur hann eigur at vera hjá tykkum, Finn og børnunum, Vinjard, Marjun og Pola. Tit vóru hennara eitt og alt og Inga tosaði eisini altíð um tykkum.

Við hesum fátøku orðum vilja vit lýsa frið yvir minnið um okkara kæra starvsfelaga og vin Ingu F. Danberg

**Starvsfelagarnir**

# Konsert í Gjónni við Gjógv



*Náttúran við Gjógv er vøkur. Sunnudagin verður konsert við Mad Cows Sing í Gjónni*

SUMMARTILTAK

*Vilmund Jacobsen*

Sunnudagin kl. 16.00 skipa Summartónar v/ Kristiani Blak fyri konsert í Gjónni við Gjógv.

Hetta er eitt áhugavert tiltak - ikki minst, tí staðið er forvitnisligt og sjáldsama náttúruvakurt.

Bólkurin, sum fer at spæla á konsertini, eitur Mad Cows Sing. Hann er stovnaður í 1996 av kenda dananum, Benjamin Koppel. Tey hava eisini vunnið onkrar virðislønir fyri síni avrik.

Við í bólkinum eru Olivver Boekboorn (obo), Benjamin Koppel (altsaksofon), Andrea Gyarfas (violin), Therese Åstrand (cello), Rikke Sandberg (klaver), Jonas Westergaard (bass) og Jacob Andersen (slagverk).

# 430 laksar og síl skulu kannast í ár

**- Í fjør vórðu 290 laksar og síl kannaði. Eingi skaðilig evni vórðu ávíst í fiskinum, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan**

UMHVØRVI

*Vilmund Jacobsen*



*Føroyskur laksur og síl eru langt undir markvirðunum fyri skaðilig evni, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, sum í ár fer at kanna 430 fiskar*

Eins og onnur lond, sum selja fiskavørur til ES, hava Føroyar eisini eina avtalu við felagsskapin um heilsufrøðilig viðurskifti. Avtalan ásetir, at hvørt ár skulu gerast kanningar av aldum fiski í Føroyum. Endamálið við kanningunum er at skjalprógva, um alifiskurin inniheldur leivdir av óynskum evnum, t.d. leivdir av heilivági, tungmetallum, vakstrarhormonum, soppaeitur og avlúsingarevni.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at skipanin fevnir um øll landbúnaðardjór, og alifiskur verður íroknaður landbúnaðardjórum. Seinast í mars mánaði á hvørjum ári senda londini sínar frágreiðingar til ES.

- Føroyska kanningarætlanin fyri ár 2001 fevndi um 290 laksar og síl. Ein laksur ella eitt síl verða tikin fyri hvørji 100 tons, sum eru útflutt í undanfarna ári, og í 2000 var útflutningurin 29.000 tons; tí vórðu 290 laksar og síl kannaði í 2001.

### Undir markvirðunum

Úrslitið av kanningunum í 2001, sigur Heilsufrøðiliga Starvsstova, vísa, at ongar heilivágsleivdir vórðu ávístar í fiskinum.

- Tungmetal-kanningarnar vístu, at innihaldið av kiksilvur, blýggi og kadmium í føroyska laksinum liggur langt undir galdandi markvirðum.

Víst verður á, at mest var av kiksilvuri, men kortini vóru nøgdirnar bert 1/10 av loyvda markinum, sum er 0,5 ppm.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur, at kanningarnar av øðrum óynsktum evnum vístu, at øll virðini vóru undir loyvdu markvirðunum.

Nú er so sýnistøkuætlanin fyri 2002, sum hendan ætlan verður rópt, løgd til rættis, og væntandi verða umleið 430 laksar og síl tikin til kanningar í hesum árinum.



# Komu illa fyri í ísinum

BJARGING

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Her ganga tey efir ísinum*

**Svalbard. Sosialurin:** Mikumorgunin í seinastu viku vóru nakrir norðurlendskir journalistar, sum vóru á skeið á Svalbard, vitni til eina bjarging á ísinum beint undir einum jøkli í stóra Ísfjørðinum, har millum annað Longyearbýurin og Barentsburg liggja.

Ferðalagið var mánadagin í seinastu viku á ferð við svenska skipinum Origo úr Longyearbýnum og norður til Ny Aalesen, sum liggur á 79 stigum, tá vit hoyrdu neyðarkall. Tað var Svalbard Radio, sum kallaði. Trý fólk vóru stødd á ísinum og tað eina, ein ungur maður hevði koygt sær beinið. Tey vóru á veg á skí úr Longyearbýnum og skuldu ganga til Ny Aalesund, ein ferð, sum vanliga tekur 12 dagar. Eftir sum ungi maðurin ikki var álvarsliga skaddur, so avgjørdi skiparin, at bíða við at fara eftir honum til mikudagin, tá hjá ferðalagið hjá okkum kom heim aftur og tíðliga mikumorgunin lógu við uttanfyri jøkulin, har fólkini høvdu sovið í telti seinastu dagarnar.

Tey høvdu tveir pólhundar við sum drógu sleturnar við viðførinum. Talan var um tveir Alaska Husky, sum eru sera harðføriri hundar, men blíðir eisini.

Vit sigldu inn móti ísinum, men skjótt stóð skipið fast og langt var millum okkum og fólkini. Tað var heldur ikki vandaleyst hjá teimum at fara longur út á ísin, tí her var hann vátur og tunnur.

Origo bakkaði og síðan aftur við fullari ferð. Her brakaði og skrykti í skipinum, men tað breyt seg í gjøgnum og kom langt inn. Síðan varð bakkað einaferð afturat og tá komu við so langt inn, at ikki var meira enn fimti metur millum okkum og fólkini. Tey komu nú út móti skipinum, landgangurin varð settur niður á ísin og tey komu umborð í øllum góðum, hundarnir fyrst.



*Hundarnir vóru móðir og spentir*

### Órógvað av eini ísbjørn

Eitt sindur viðtikin vóru tey og troytt og tað var ikki uttan grund. Tí um seinasta døgnið høvdu tey verið órógvað av eini ísbjørn, sum hevði verið tætt hjá teimum. So tætt onkuntíð, at tey vóru um at skjóta hana.

Hendan morgunin gekk ísjørnin á ísinum og í kikara sást hon væl. Hon ræddist skipið og kom ikki nær. Talan var um eina tvey ára gamla hannbjørn søgdu ísbjarnakøn mær.

Kanska var tað ikki skipið hon ræddist, tí longur inni á ísinum var hópin av kópi, og hon nartlaðist upp í teimum.

Teir tríggir óhepnu skírennararnir fingu ein tiltrongdan kaffimunn og morgunmat og ferðin hjá teimum var at enda komin. Heima í Longyearbýnum stóð flogfarið og bíðaði og tey komu ongantíð norður til Ny Aalesund. Men tey ætla sær aftur næsta ár.

Hundarnir vóru eisini ávirkaður av bjargingini. Tað gekk av báðum endum hjá tí eina, meðan hann stóð bundin har í eini ketu. Og skjótt var ketan tann beri bleyti grøni guli..... Hundurin var blíður og hoppaði upp til øll og ketan varð drigin gjøgnum evjuna og upp á brøkurnar hjá teimum, sum hildu seg framat.

